# B36 ímóti kynsligari misnýtslu

**Ungdómsdeildin hjá B36 fer komandi ár undir eitt stórt átak ímóti kynsligari misnýtslu. Átakið er ætlað bæði sum ein stuðul til felagskapin Kris og sum ein eggjan til at bróta tøgnina um kynsliga misnýtslu av børnum**

ÁGANGUR
*Dorit Hansen*
*dorit@sosialurin.fo*




*Eftir ætlan skulu øll børnini í ungdómsdeildini hjá B36 spæla í t-troyggjum við áskriftini: Vit eru ímóti kynsligari misnýtslu. Hetta er partur av stórum átaki, sum skal stuðla arbeiðnum ímóti kynsligum ágangi og bróta tøgnina rundan um henda óhugnaliga veruleika*

Børn skulu hava loyv at spyrja, hvat kynsligur ágangur merkir. Og tey skulu vita, at tey hava rætt til mørk, sum vaksin ikki mugu bróta. Hetta varð endurtikið fleiri ferðir á tíðindafundinum hjá B36 og Kris í Miðlahúsinum í gjár.

Í ungdómsdeildini hjá B36 eru áleið 3-400 børn og ung. Og komandi leikár fara øll liðini at spæla í eins leikbúnum, uttan frámerki hjá nøkrum einstøkum sponsori, men við eini áheitan um at stuðla arbeiðnum ímóti kynsligum ágangi. Umframt KRIS eru eisini sálarfrøðingur, sjúkrarøktarfrøðingur og løgregla knýtt at átakinum.

Guðmundur Guðmundsson, formaður í ungdómsdeildini hjá B36 greiddi frá, hvat nýggja átaki snýr seg um. Á tíðindafundinum var forkvinnan í Kris eisini til staðar, tí átakið verður gjørt bæði saman við Kris og sum stuðul til Kris.

– Hví ikki siga opið við børn okkara, at hetta góðtaka vit ikki, og hetta skulu tey ikki finna seg í, spurdi Guðmundur Guðmundsson.

– Hetta er eitt stórt tabu, men vit hava brúk fyri at bróta tøgnina, segði hann.

Hann greiddi frá, at B36 hevði gjørt eitt stórt arbeiði við innanhýsis kunning, og felagið hevur greiðar reglur, hvat venjarar kunnu og ikki kunnu. Tildømis hava venjararnir ikki loyvi at skifta saman við børnunum, og børnini vita hetta.

– Teksturin á t-troyggjunum kann tykjast sterkur, men hann er eisini ætlaður til at fáa okkum øll at hugsa og at práta. Stóð bara Kris og eitt telefonnummar, legði tað ikki upp til prát, sigur Guðmundur Guðmundsson.

Hann helt eisini at tað var meira hugaligt at hava ein slíkan boðskap á troyggjunum enn navnið á einum øllum fastfood-framleiðara.

## Politikarar hugsa í betong

Eitt telefonnummar skal standa á blusunum, og hvørja ferð mann ringir ella smsar til hetta nummar gevur mann 25 krónur til Kris. Guðmundur Guðmundsson legði dent á at, peningurin fer óskerdur til Kris.

Átakið sjálvt er ikki ókeypis, og B36 hevur tí søkt fyritøkur um stuðul. Vælviljin hevur verið stórur, og av teim 40 fyritøkunum, sum vórðu spurdar, var bara ein, sum ikki vildi vera við.

– Ítróttarfeløg hava eina serliga ábyrgd, tí vit hava børn fleiri tímar um vikuna. Men vit gera hetta eisini, tí vit síggja at politikararnir hugsa meira í betong enn í menniskjum, segði Guðmundur Guðmundsson.

– Politikarar hava ongar trupulleikar við at játta túsund milliónir til betong, men arbeiðið ímóti kynsligum ágangi fær nakrar fáar hundrað túsund krónur, staðfesti formaðurin í ungdómsdeildini hjá B36.

## Upplýsing og hjálp

Forkvinnan í Kris var við á tíðindafundinum og segði, at tað hevði verið ein sera rørandi løta, tá umboð fyri B36 ringdi og greiddi teimum frá ætlanunum.

– Tað er tíverri alt ov nógv, sum eru fyri kynsligum ágangi í Føroyum. Og eg vóni, at vit við hesum kunnu vera við til at bjarga nógvum børnum frá at vera kynsliga misnýtt av vaksnum, segði hon.

Kris skal eisini vera við í upplýsandi tiltøkum hjá B36 fyri venjarum og foreldrum, og sálarfrøðingur, sjúkrasystur og løgregla skulu eisini knýtast til átakið.

Ungdómsdeildin hjá B36 leggur dent á, at hetta er eitt fyribyrgjandi tiltak, og um okkurt mál kemur fram um misnýtslu, gera tey einki við tað sjálvi, men vísa málið víðari til barnavernd og løgreglu.

---

# Rættleiðing

**Kynslig misnýtsla er eitt viðkvæmt og óhugnaligt evni, og tí hevur tað serligan týdning, at miðlarnir ikki bera skeiv tíðindi**

## 42 neyðarróp

Sosialurin hevði fyrr í vikuni eina forsíðuyvirskrift, sum ljóðaði: 42 neyðarróp um misbrúkt børn. Hetta vísti til, at felagsskapurin Kris í november mánaði hevði fingið 42 áheitanir um hjálp frá fólki, sum høvdu verið fyri kynsligum ágangi.

Her var mest talan um vaksin fólk, sum høvdu verið fyri kynsligum ágangi sum børn.

Hetta kom týðuliga fram í greinini, men um yvirskriftin gav tað inntrykk, at talan var um børn, sum vóru misnýtt í november, so biði eg um umbering.

Hetta hevur týdning, tí um eitt mál um børn kemur til Kris, verður tað sjálvandi sent víðari til barnavernd og løgreglu.

## Hvat merkir kynslig misnýtsla, babba?

Hesin setningur varð brúktur sum yvirskrift til ein stubba á Portalinum um tíðindafundin hjá B36 og Kris.

Henda yvirskrift varð vald, tí formaðurin í ungdómsdeildini hjá B36 endurtók henda setning fleiri ferðir á fundinum.

Hann vísti á, at hann sum pápi hevur serliga ábyrgd at upplýsa børn síni um, hvat er rætt og hjálpa teimum at seta mørk mótvegis vaksnum fólki. Og hann ynskti, at hansara børn og onnur børn skuldu hava dirvi at spyrja um hetta.

Sosialurin hevur fingið eina klagu um, at vit við hesari yvirskrift leggja menn undir at vera teir einastu, sum misnýta børn. Men tað var als ikki ætlanin. Tað eru bæði menn og kvinnur, sum misnýta. Og sjálvandi hava bæði pápar og mammur ábyrgd at hjálpa børnum sínum, so tey ikki vera fyri kynsligum ágangi.

Dorit Hansen
Blaðfólk